Tinglýsingargjald: kr.:

## Tilmeldari

**Navn:**

**Bústaður:**

**Tlf.:**

**OGNARVEÐBRÆV**
**(Virkisveð)**

**Skuldari-(arar) navn/nøvn og bústaður/bústaðir:**

veiti við hesum

**Kravánari:**

mær sjálvum/okkum ella tí, ið hetta veðbræv skuldi verið avhent til, til ognar ella sum veð, veðrætt, við/uttan persónligari skuldábyrgd í øllum, ið virkið eigur og framyvir kemur at eiga av einum ella fleiri av teimum niðanfyrinevndu sløgum av ognum, sbr. tinglýsingarlógarinnar § 47d, stk. 3, nr. 1 – 8, til trygd fyri skaðaleysa gjalding av, hvat virkið til hvørja tíð skuldi skylda kravánara, tó ikki omanfyri

**Upphædd:** kr.

skrivað krónur 00/100

**Renta og gjaldstreytir:**

Rentan á veðbrævinum er: %

Roknað frá 11/12 2014

Rentan verður goldin hvønn ársfjóðring/hálvárliga

Fyrstu ferð tann

**Uppsøgn:**

Hetta veðbræv kunnu bæði kravánari og skuldari til hvørja tíð siga upp við daga freist.

**Veðsetti-/u lutur/ir:**

Veðið fevnir um allar niðanfyritilskilaðu ognir, ið krossur er settur við:

- ☐ Einføld krøv, sum stava frá sølu av vørum og tænastum (tinglýsingarlógarinnar § 47d, stk. 3 nr. 1)
- ☐ Rávørugoymslur, hálvvirkaðar og lidnar vørur (tinglýsingarlógarinnar § 47d, stk. 3, nr. 2)
- ☐ Akfør, sbrt. § 42a, um veðsetari rekur virki við keyp og sølu av akførum (tinglýsingarlógarinnar § 47, stk. 3, nr. 3
- ☐ Rakstrarinventar og rakstraramboð (tinglýsingarlógarinnar § 47d, stk. 3, nr. 4).
- ☐ Rekevni og onnar hjálparráð (tinglýsingarlógarinnar § 47d, stk. 3, nr. 5)
- ☐ Innstøða (tinglýsingarlógarinnar § 47d, stk. 3, nr. 6)
- ☐ Góðvild, økisnøvn og rættindi sbrt. patentloven, varemæreloven, mønsterloven og løgtingslóg um upphavsrætt (tinglýsingarlógarinnar § 47d, stk. 3, nr. 7)
- ☐ Veiðu (tinglýsingarlógarinnar § 47d, stk. 3, nr. 8)

**Frammanfyristandandi heftingar:**

**Fulltrúarhavi og fráboðanir til veðkreditor**:

Fráboðanir um rættarsókn og meira, ið skulu sendast veðkravánara, biðjast sendar

ið verður heimilaður mína vegna at skriva undir átekningar av øllum sløgum á hetta veðbræv, sum kvittanar-, avhendingar-, broytingar- og úrloysnarátekningar.

**Serligar samtyktir:**
Veðrætturin verður veittur til trygd fyri allar gjaldingar eftir hesum veðbrævi í lutunum nevndir eru frammanfyri og í tryggingarupphæddum teirra, eins og veðsetingin fevnir um avkast av veðnum, eisini leiguinntøkur. Veðsetari hevur skyldu at hava tað veðsetta, eisini alt tað, ið hoyrir til veðið, fullvæl tryggjað móti eldi og øðrum vága,

sum vanligt er at tryggja og eisini øðrum vága, ið kravánarin serskilt krevur tryggjaðan.

Verða renta ella avdráttir ikki goldin rættstundis, kann kravánarin krevja áogn sína innloysta, sbr. pkt.6 a í veðbrævaformála landsstýrisins (Virkisveð).

Bústaðarskifti skal boðast kravánara.

Annars galda tær á síðu 4 – 5 skrivaðu ásetingar, Veðbrævaformáli Landsstýrisins (Virkisveð).

Váttað verður, at veðið er ikki veitt til fyrimuns fyri nærstandandi skuldarans (skuldarans ella veðsetarans), sbrt. tinglýsingarlógarinnar § 47f, stk. 1, og pkt. 7 í veðbrævaformála landsstýrisins (Virkisveð).

**Undirskriftir:**

Dagfesting:

Verður ognarveðbrævið bert undirskrivað av veðsetaranum, váttarveðsetarin samstundis við undirskrift síni, at hann er ógiftur, ella at ognirnar ikki eru fevndar av grein 19 í "lov om ægteskabets retsvrikninger". Er veðsetarin giftur, gevur medundirritaði hjúnafelagi loyvi til veðsetingina. Er hjúnafelagin samánari, undirskrivar hann sum veðsetari.

Undirskriftir:

**Sannanarátekning:**

Til vitnis um, at undirskriftin/undirskriftirnar eru sannar, dagfestingin bein og útgevarin/útgevararnir myndigir:

Navn:

Starv:

Bústaður:

Undirskrift:

Navn:

Starv:

Bústaður:

Undirskrift:

**Veðbrævaformáli landsstýrisins (Virkisveð)**

1. Gjaldingar eftir hesum veðbrævi skulu vera rindaðar postfrælst á bústaði kravánarans, sum tilskilaður er á 1. síðu ella á øðrum staði í landinum, sum kravánarin ger skuldaran kunnugan við.

2. Rættstundisligar eru allar gjaldingar ikki seinni enn sjeynda dagin eftir gjaldkomudag, við terminsgjaldingar fyrsta gjaldkomudag. Er gjaldkomudagurin ella síðsti stundisligi gjalddagur, halgidagur, leygardagur, ólavsøkudagur, flaggdagur ella grundlógardagur, verður freistað til gerandisdagin eftr. Á sama hátt flytist lokadagurin við allar freistir eftir hesum veðbrævi. Tá ið gjaldingin, áðrenn henda nevnda freist er úti, er hjá Posta til flytingar á gjaldstaðin, er hon rættstundislig.

3. Skuldarin hevur skyldu at boða kravánaranum frá bústaðarskifti. Hesa fráboðan ber ikki til at skriva á gjaldingarblað, tá ið tað stendur á slíkum oyðublaði, at tað er ikki ætlað til tílíka fráboðan. Ákrav frá kravánaranum, so eisini uppsøgn, kann vera sent skuldaranum ella sett fram á seinasta kunnuga bústaði hansara um enn bústaðarskifti hevur verið, uttan so at kravánarin kennir nýggja bústað skuldarans. Verður kravánarin varur við, at uppsøgnin av bústaðarskiftinum er ikki komin fram til skuldaran, skal hann siga skuldaranum frá uppsøgnini, um nýggi bústaður skuldarans er til skjals á fólkayvirlitinum ella fæst lagaliga á annan hátt.

4. Skuldarin bindur seg til at hava veðið, um so er, at tað er veitt sambært § 47d, stk. 3, nr. 2, 3, 4, 5, 6, ella 8, fullvæl brunatryggjað.

5. Veðið fevnir um endurgjalds- og tryggingarupphæddir, ið koma í staðin fyri tað veðsetta, men ikki annað, ið kemur i staðin. Veðið fevnir ikki um ognir, ið koma fram við vanligari nýtslu av veðnum og eru ætlaðar at verða tiknar frá í sambandi við vanligan rakstur av virkinum, uttan at talan er um veruliga nýtslu av veðnum, uttan so at talan er um ognir av einum slag, sum í sjálvum sær eru fevndar av veðrættinum.

6. Tó at veðbrævið er ikki uppsigandi ella uppsagnarfreistin ikki úti, er kravánaranum loyvt at krevja áogn sína goldna, tá ið soleiðis er:

   a) at renta ella avdráttur ikki eru goldin í seinasta lagi seinasta gjalddag.
   b) at veðið minkar munandi í virði ella verður vanrøkt, og fullgóð trygd verður ikki veitt, tó kravd,
   c) at skuldarin noktar kravánaranum ella fulltrúa hansara atgongu til at skoða veðið,
   d) at skuldarin ikki, tá ið kravt verður, prógvar, at veðið, um so er, at tað er veitt sambært § 47d, stk. 3, nr. 2, 3, 4, 5 6 ella 8, er fullvæl brunatryggjað, og
   e) at veðið ella fyri veðtrygdina munandi partar verða avhendir til 3. mann ella á tvingsilssølu

7. Veðið kann ikki verða veitt til fyrimuns fyri nærstandandi skuldarans (skuldarans ella veðsetarans), sbrt. tinglýsingarlógarinnar § 47f, stk. 1. Við nærstandandi skilst, sbr. konkurslógarinnar § 2:

a) Hjúnafelagar, skyldfólk í stígandi- og fallandi ættlegg, systkin, hjúnafelagar hjá nevndu persónum og aðrir persónar, ið hava staðið hvør øðrum serliga nær.
b) Eitt felag og ein persónur, um so er at persónurin ella hansara nærstandandi beinleiðis ella óbeinleiðis eiga meginpartin av kapitali felagsins.
c) Tvey feløg, um so er, at annað ella tess nærstandandi beinleiðis ella óbeinleiðis eiga meginpartin av kapitalinum í hinum felagnum, ella um so er, at sami persónur ella felag ella sínámillum nærstandandi persónar ella feløg eiga meginpartin av kapitalinum í báðum feløgum.
d) Aðrir persónar, feløg ella felagsskapir, ið hava samsvarandi áhugafelagsskap, sum skilað til undir litra b ella c.